# Nýggj fløga við Hanusi

*Seinasta hond verður nú løgd á eina fløgu við tónlistamanninum Hanusi Johansen og Aldubáruni. Fløgan er ætlað at koma út á runda føðingardegi listamansins*

DAGFINN OLSEN

Hanus Johansen er ein av okkara best umtóktu tónlistamonnum. Eisini er hann eitt av dyggastu umboðum Føroya uttanfyri landoddarnar, har hann er høgt mettur. Serstakliga í Norðurlndum hevur Hanus vakt ans við síni sermerktu rødd, lagsmíði og útstráling á palli og á baki hevur hann hundraðtals konsertir í Føroyum og í útlondum.

Nú verður arbeitt við at geva út fløgu við upptøkum frá konsertunum, sum Hanus hevði við klassiska bólkinum Aldubáruni í fjør. Hóast væl dámdur, so er ikki so nógv til taks á plátu ella fløgu, sum Hanus hevur latið úr hondum. Bert ein útgáva ber navn hansara. Tað er plátan frá 1988, har Hanus setti løg til og sang yrkingar eftir Pól F.

Hanus syngur tó á fleiri útgávum og eigur eisini løg á fleiri útgávum hjá øðrum. T.d. eigur hann okkurt, ið Steintór Rasmussen hevur givið út og somuleiðis okkurt, ið er á fløguni hjá Jógvani Andrias Joensen. Eisini syngur Hanus á nøkrum av Frændur útgávunum, á Springs (1989), á Hinumegin Ringvegin hjá Kára p. og á barnafløgunum Nósi (1984), Syng bara við (1985).

## Hanus og Aldubáran

Orsøkin til nýggju útgávuna við Hanusi finna vit í, at ein frálíkur møguleiki stak seg upp, tá Hanus í 1999 hevði konsertir saman við Aldubáruni.

Hetta voru konsertir við útsetingum av løgum, sum Hanus hevur sett til føroysk orð eftir m.a. Rikard Long, Bernhard Brim, T. N. Djuurhus og Poul F. Joensen. Tað var so tónleikabólkurin Aldubáran, sum spældi undir til sang og guitarspæl hjá Hanusi. Konsertirnar eyðnaðust so væl, at øll samdust um at endurtaka tiltakið í februar 2000. Eisini vóru tónleikararnir samdir um at taka konsertirnar uppá band, fyri at royna at fáa til vega dygdargott tilfar til eina konsertfløguútgávu.

Í døgunum 3. til 6. februar 2000 vóru so upptøkur gjørdar av aðalroynd, tveimum konsertum, umframt eykaupptøkur aftaná seinastu konsertina.

Hanus og tónleikararnir hava redigerað upptøkurnar, sum eru sera spennandi, og hóska sera væl til almenna útgávu.



*Hanus fyllir í ár runt, nevniliga 50 ár, so útgevarar hildu vera hóskandi at halda dagin, 18/6, við nýggjari útgávu*

Plátufelagið Tutl hevur boðið seg fram sum útgávufelag. Hetta inniber útbreiðslu bæði í Føroyum og í útlondum. Tutl metir, at ein fløguætlan sum tann hjá Hanusi og Aldubáruni, má sigast at verða just ein sergrein innan virkið hjá TUTL, tá hugsað verður um innihald av bæði fólkatónleiki og klassiskum tónleiki, og hóast at her er talan um sera viðkomandi og lættan tónleik, so er hetta avgjørt nýskapandi.

## Á føðingardegnum

Nýggja útgávan hevur fingið stuðul frá Mentunargrunni Føroya Løgtings og øðrum við, men høvuðsstuðul er Formula Føroyar.

Útgávudagur er ásettur. Hesin verður tann 18. juni. Hesin dagur er samstundis føðingardagur tónlistamansins. Hanus fyllir í ár runt, nevniliga 50 ár, so útgevarar hildu vera hóskandi at halda dagin við nýggjari útgávu, ið fær heitið Bouquet.



*Konsertirnar við Hanusi og Aldubáruni eydnaðust so væl, at tónleikararnir samdust um at royna at festa á band, so dygdargott tilfar fekst burturúr til útgávu. Henda kemur út á føðingardegi Hanusar tann 18. juni*

# Klipp av bygd eftir Philippe

*Í dag klokkan 14 letur listamaðurin Philippe Carré upp sýning í Smiðjuni í Lítluvík. Nýggju myndirnar hava felagsheitið »Á bygd«*

Í dag 17. mai kl. 14 letur Philippe Carré upp eina listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík. Framsýningin nevnist »Á bygd«.

Framsýningin er í tveimum pørtum, í niðaru hæddini myndir frá í ár av bygdum, og uppi á loftinum eru myndir av Havnini, ið vórðu kliptar í fjør.

Myndirnar av bygd eru bygdar á sama hátt, sum myndirnar úr Havn á framsýningini í fjør. Tað vil siga, at spælt verður við sjónarhornini. Myndevnið verður sæð úr luftini og av landjørðini í senn. Tó verður í bygdamyndunum nýtt víðari sjónarhorn, tí ikki bert sæst ein býlingur, men øll bygdin innan bøgarðarnar.

Myndirnar eru ikki allar úr pappísrklippi. Eisini onnur tøkni verður nýtt, so sum blýantur, tusj, vatnlitir og akrylmáling.

## Í 25 ár

Philippe hevur síðan hann fyrstu ferð sýndi fram á Ólavsøkuframsýningini í ´82 havt framsýningar í Smiðjuni í Lítluvík, í Norðurlandahúsinum, verið við á nógvum Ólavsøku- og Várframsýningum, og havt tvær framsýningar uttanlands.

Hann hevur víst sín serliga áhuga fyri Havnini í framsýningunum »Álvatinganest« (NLH, ‘90), »Blá smoga í vindsins vøggu« (Smiðjan ‘91) og »Verðin er lítil undir hesum grønu seglum« (Smiðjan ‘92), »Havnin - konstruktión undir stjørnunum« (Smiðjan ‘98), »Havnin – summarsuita« (Smiðjan ‘99).



*Tað eru 25 ár, síðani Philippe Carre kom til Føroya fyrstu ferð. Í dag klokkan 14.00 letur hann upp framsýningina »Á bygd«*
***Mynd: Álvur Haraldsen***

Philippe er føddur í Bourgogne í Fraklandi í 1953. Hann er útbúgvin fotografur og hevur gingið á Grafisk Skole í Århus, og hevur síðani 1982 arbeitt burturav sum listamaður. Stóran partin av hesi tíðini hevur hann verið búðsitandi í Føroyum og tað er hann framvegis.

Framsýningin í ár er eitt slag av hátíðarhaldi, tí 23. mai eru tað 25 ár síðani Philippe fyrstu ferð kom til Føroya.

Framsýningin »Á bygd« letur upp í dag klokkan 14. Klokkan 16 spæla Kristian og Mikael Blak egin verk. Framsýningin er opin hvønn dag frá klokkan 14 - 20. Opið er til 24. mai.

*- do -*

## Grotto

*Í samband við Summartónar verður aftur skipað fyri útferðum við Norðlýsinum í summar: Concerto Grotto*

Grotto skráin fyri maj/ August 2000 er henda:

Mánadagur 22/5 Karsten Vogel kl 18.00–23.00.
Mánadagur 29/5 Karsten Vogel kl 18.00–23.00.
Mánadagur 5/6 Anda Kuitse kl 18.00–23.00.
Mánadagur 12/6 Kristian Blak kl 18.00–23.00.
Mánadagur 19/6 Niels Arge Galán kl 18.00–23.00.
Mánadagur 26/6 John Tchicai kl 12.00–18.00.
Mikudagur 28/6 John Tchicai kl 12.00–17.00.
Hósdagur 29/6 Håkan Hagegård kl 13.00–18.00.
Mánadagur 3/7 Heðin Ziska Davidsen kl 13.00–18.00.
Mánadagur 10/7 Inga Juuso kl 13.00–18.00.
Mánadagur 17/7 Anders Hagberg kl 13.00–18.00.
Mánadagur 24/7 Kristian Blak kl 13.00–18.00





Sosialurin - 311820